ÚR SUÐUROY

Málið.

Bæði bløðini, »Tingakrossur« og »Dimmalætting« vóru nú í seinastuni farin eitt sindur at høggast um eitt fornt og kunnugt stríðsmál: **føroyskt mál í skúlum okkara.**

»Tingakrossur« bar í fyrsta umfari boð um ta durabríkastøðu mál okkara hevði í »Færøernes Mellem- og Realskole« í Tórshavn, at henda eina lærugrein, tað mál, ið fjøldin av næmingunum nýta sum talumál, móðurmál barnanna, millum slíka rúgvu av meir ella minni týðandi lærugreinum, var sø hogt í mæti, at barnið sjálvt, — ella sjálvandi foreldur barnsins — kundu ráða fyri, um tað skuldi læra tað ella velja okkurt annað í staðin!

Og bladið hanv sær hesum viðvíkjandi høvi til at illa eitt sindur sambandsflokkin fyri tann — um ein kann siga — lunkaða atburð, flokkurin hevur sýnt og enn sýnir í málspurninginum.

Fyrsti journalistur »Dimmalætting«ar, hin kendi L.-S., ið sambandið tykist at nýta sum ein marknavernara, ein »duellant« — hina reinu politisku gongdina »samhørighedens« kláru og sjálvfylgjuligu »idé« — eru tað aðrir, ið eins og ein lýsandi fakkul halda upp fyri sínum partamonnum — tráddi so fram, og á vælpoleraðum donskum greiddi hann so frá flokksins støðu, ella kanska rættari sagt, royndi í kámum vendingum enn meir at flokja sambandsins ógreiddu og nógmikið fløktu gongd í hesum máli.

Tað er vist almanna kunnugt — fyri her eitt sindur meir at nerta við hetta so týdningarmikla mál í fólkalívi okkara — at sambandsflokkurin í síni stevnuskrá hevur nakað um, at flokkurin ætlar í øllum forum at syrgja fyri »det færøske Sprogs Røgt og Pleje«; men millum manna, ið geva hesum ans, má hetta punkt í stevnuskránni í royndum tykjast at vera ógviliga kámt og villandi; tí eftir sum tað hevur sýntst gjognum árini, so hevur hesin flokkur, tá ið málspurningurin hevur verið havdur á lofti, altíð aftrað seg og við ymsari undanforslu skotið sakina til viks og ongan hug tykst at hafa, ið hvussu er at fáa máli okkara ein toluliga ærumiklan sess her á landi.

Í samburði við slíkt kann eisini vera vert at nevna, at vit leggja til merkis, at tá ið sambandsformaðurin treður fram fyri almenningin í skrift, nýtir hann altíð danskt mál, enntó at vit í »Føroya fólks songbók« síggja, at navn hansara stendur undir mergjaðum og á ramligum føroyskum yrktum fosturlandssangum. Og sum av onkun framhildið, tykist ikki okkara óivað fullføroyski L.-S. at hava besta hugin til at flyta síni politisku hugskot fram á móðurmálinum. Eisini tykist tað á tingi ikki at vera ætlanin hjá nógvum av tingmonnum okkara at lívga og røkta okkara mál; heldur sýnast teir við talu síni at hava í kvittanum sum best at ørkymla og lamlosta málið.

Framferð flokksins viðvíkjandi undirvísingarmálinum í skúlum okkara hevur tó einamest til fullnar prógvað, hvussu føroyskur hesin flokkur er, og hvussu væl teir eru til sinns at røkta og ansa okkara máli.

Henda sak — § 7 í skúlalógini — er nú sum nevnt so gomul í garði, og bæði ungum og gomlum hevur verið lagað at sitið sum áhoyrarar og lurta eftir teirri móttoku, hon hevur fingið á tingi, og teimum argumentum, fram hava verið sett fyri at halda alt í síni gomlu bakventu gongd. . . .

Og so gongur alt enn við sama lagi.

Lógin er, at undirvísingarmálið skal vera danskt, ið øll vita ikki er barnanna talumál. Okkara málspurningur er tí so heilt ólíkur t. d. Noregs: har eru í mongum forum tvinnandi talumál at ansa eftir; her hjá okkum bert eitt.

Øll vita, at bæði lærari og børn altíð í dagligari talu nýta føroyskt mál, og at danskt mál hevur verið og enn er eitt fremmant mál, ið nokk er okkum kunnugari enn onnur útlendsk mál, men sjálvandi ikki fyrr enn vit í skúlunum hava lært tað. Men øllum er greitt, at eitt mál, vit fáa kunnleika til fjgjognum bokur, og sum vit næstan aldrin taka í munn, uttan onkuntíð kanska, tá vit hitta ein danskan lækna, verður stirvið og liðaleyst og er eitt óhandaligt reiðskap at nýta sum talumál, tá ein skal kenna børnum og skal leggja sær nær at fáa tey at skilja seg og tað, tey skula fáa kunnleika í. Hasin loysningur, at hvør einstakur lærari vist skal velja, hvat mál hann vil nýta, skilja øll, er ómøguligur, og er ikki til at praktisera.

Eitt undirvísingarmál her og annað har! alt kanska eftir sum lærarans politiska støða verður kallað. Og so vita vit, hvussu teir ymisku lærararnir fara at falla fólki í eygum.

Tí tað sýnið fólksins politisku oddamenn hava í ymsum spurningum, hava teirra veljarar eisini. Og tað er kunnugt, hvussu vanvirðisliga tíverri enn ein fjøld av okkara fólki sær uppá okkara mál, og syndarligast er, at vanvirðingin verður hildin við líka av teimum, ið skulu eitast at vera undangongumenn og ráðarar í tí mentunnarliga og politiska lívi her á landi. Alt sjálvandi útfrá tí sjónarmiði, at fólkið hevur ikki hug at broyta nakað! fólkið, veljararnir, mugu altíð spyrjast, tá ið okkurt er, ið politikararnir sjálvir ikki dáma ikki at fáa framt.

Men ein kann spyrja: Hví eftirlíka teir ikki fólkinum, fjøldini, í mongum øðrum, sum kunnugt er, ikki dámar fólki? Hví taka teir t. d. ikki og strika Danmarkar søgu av skúlaplanini? Fólk tosa ofta um, hvussu nyttuleyst tað er at sita og læra um »deyðar danskar kongar«!

Árni.

Hr. Johan Albert Hentze, Øravíkslið.

Som Svar paa det mod mig i »Føroyatíðindi« Nr. 13 rettede usandfærdige Angreb, skal jeg hermed gøre bekendt, at de Beskyldninger som Hr. Hentze retter mod mig, kun er ondsindet Bagvaskelse og har ikke noget med Sandheden at gøre.

Hvorfor Hr. Hentze lader sig bruge til at fremkomme med saadanne Beskyldninger mod mig, og hvem der gør Brug af ham, er ikke saa svært at gennemskue.

Hvad der forefaldt mellem Hr. Hentze og mig, var kort og godt dette: Om Formiddagen Kl. 10½ den 27. Marts, da jeg kom gaaende fra »Ísvirki« og ned ad Kajen til det Pakhus, hvorfra Køduddelingen foregik, blev jeg tiltalt af Hr. Hentze, der spurgte mig, om det var muligt at faa noget Kød, til hvilket jeg sagde: »Hvorfor ikke? Sidste Gang fik du (Uddelerne, undertegnede og Hr. A. Olsen udlagde Pengene for Kødet foreløbig for Hr. Hentze, og sendte ham det, da han laa syg), saa faar du vel ogsaa denne Gang, for nu har vi mere Kød end sidst«. Hentze siger da til mig: Jeg har ingen Penge, men har noget Tilgodehavende hos Kommunen. Jeg har tænkt mig, at det maaske kan afregnes den Vej. Mit Svar til dette lød saaledes: »Det er kedeligt, at Kødet ikke betales kontant, for det skulde helst betale sig selv, men der er flere, som faar Kød imod Afskrivning af Tilgodehavende for Arbejde hos Kommunen, og saa vil du selvfølgelig ogsaa faa det«. Derpaa gik jeg ned i Pakhuset og fortsatte Kødudsalget. Hen paa Eftermiddagen blev vi færdige. Paa det Tidspunkt var der et Par Stykker, der havde tegnet Bestilling paa Kød, og deriblandt Hr. Hentze, som ikke havde indfundet sig til Afhentning af Kødet.

Ved forrige Køduddeling gjorde vi den Erfaring, at nogle, som havde tegnet sig for Kød, aldrig afhentede Kødet, som vi havde aflagt og holdt reserveret for dem, hvorved vi, da vi ikke vilde levere det til andre, led Tab paa det. Dette kunde selvfølgelig ikke gentage sig, hvorfor vi denne Gang, da vi maatte afslutte Kødleveringen, solgte det uafhentede Kød (altsaa ogsaa Hr. Hentzes) til andre berettigede.

Hvad min »Broderskabsaand«, Behandlingsmaade og Optræden angaar, vil jeg ikke nedværdige mig at diskutere med Hr. Hentze. Jeg tænker mig, de fleste af Læserne kender Hr. Hentze, og vil forstaa min Beslutning.

En anden Gang, Hr. Hentze vil forsøge sig som Skribent eller offentlig Anklager, vil jeg gerne anmode ham om at rydde op i Hjernekisten først, saa han kan have en Mulighed for at kunne holde sig til de faktiske Forhold, hvad der desværre ikke kan siges at han i sit sidste Forsøg har bestræbt sig paa. Men det er maaske ogsaa virkelig umuligt for ham eller uforenelig med hans Mentalitet.

Edward Mortensen.

---

†

Hans Andreas Fagradal.

Fúsur og raskur legði hann í havið. Eftir sótu konan og 4 børn. Nú óveðrið hevur rasað, og hvør einasti dagur hevur borið tíðindi um skaða og lívsvanda, sat hon, umringd av børnum, eins og flestu mommur kring Føroya land við bivandi hjarta fyri, at hin kalda bylgjan skuldi taka hennara og barnanna einasta álít og forsyrgjara. Og so komu tey tungu tíðindi, at hann var deyður. Men tað var ikki havið, ið hevði rætt ta koldu hondina út. Ein heftigur lungabruni hevði gjort enda á honum — hann var deyður á landinum á sóttarsong. Hesi tíðindi eru tyngri og daprari, enn um tað var hin hjartaleysa bylgjan, ið var banamaðurin. Tí so undarliga er tað skipað, at fyri sóttarsongardeyðan er eingin trygging, ið kann veita teim eftirsitandi økonomiskan stuðul. So logið er tað, at meðan einkjan við børnum fær um einar 5000 kr. í ólukkutrygging, tá ið maðurin er deyður á sjónum, fær hon einki, um hann doyr á sóttarsong, hóast trongdin er tann sama. Hetta er rangvort og órættvíst. Okkara góðu menn megu rætta henda ójavna. Lógir megu skipast soleiðis, at tey eftirsitandi fáa sama økonomiska stuðul, annaðhvørt forsyrgjarin doyr á landi á sóttarsong ella á sjónum ella við ólukku á annan hátt.

Hans Andreas Fagradal var við skipinum »Albert«, ið lá inni á Reykjavík við skaða. »Island« hevði siglt á tað og gjørt tí stóran skaða. Sum frættist, gongur »spanska« ella ein ring influensa á Reykjavík, og hevur harra Fagradal óivað fingið sjúkuna í landi.

Friður yvir minninum og styrkur og uggi veitist teim syrgjandi.

„Købmand“ í „Føroyatíðindi“.

Ein »Købmand« í »Føroyatíðindi« spyr um, hvussu Froðbiar søknar kommuna býtir kjøtið út, ið hon fær at selja fyri ein bíligan prís til fbúgvararnar.

Til henda spurning er at svara, at við útbýtingini ræður eingin »Tilfældighed«. Hon fer fram strangt eftir einum regulativi frá amtinum.

Aftaná hvørja útbýting verður ein listi sendur til amtið yvir øll tey, ið hava keypt kjøt frá kommununi, og verður á hesum lista sagt frá, hvussu nógv kjøt er selt »pro persona«.

Søknarstýrið fyri Froðbiar søknar kommunu.

Heimkomin skip.

Tvøroyri: Hamranes 13000, 195 skpd., Vágoy 1000, Brimnes 4500, Fagranes 10000.

Vág: W. G. Marshall 11000.

Kjøt

vænlast við »Tjaldrinum«. Tey, ið ynskja kjøt, og sum eru rættindað til tess, biðjast venda sær til Edw. Mortensen, søknarstýrislim, innan Tjaldurs lossing.

Søknarstýrið á Tvøroyri.

Máling
Tapet
Linoleum

Tlf. 81. **Poul Arne Poulsen.**

Seteplir.

Aftur í ár havi eg tað slagið av seteplum, sum allir menn eru á einum máli um, er tað besta.

Telf. 61. **D. J. Enni,** Telf. 61.
Tvøroyri.

Høsnanet.

Høsnanet í ymiskum hæddum og meskuvíddum fæst hjá

Telf. 61. **D. J. Enni,** Telf. 61.
Tvøroyri.

Kjøtforrætning

mín er flutt í ta gomlu kjøtbúðina hjá Theodor Gregersen.

Hiitt besta kjøtið — ferskt og skerpikjøt —, pálegg, tálg, grønsakir, át- og seteplir og fruktir, súreplir og aðrar fruktir fæst til rímiligar prísir.

Eli Mortensen,
Telf. 56. Tvøroyri.